**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 1702**
**Tíðarskeið 15/2-22/2-2017**

---

**Fólk frá Havstovuni:** Poul Vestergaard og Regin Kristiansen.

**Ábyrgd:** Karin Margretha H. Larsen

**Endamál:** Endamálið við túrinum er at fylgja við broytingunum í havinum kring Føroyar. Túrurin er ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir standardskurðunum.

**Reiðskapur:** Seabird-CTD við rosettu, WP2 glúpur og útgerð at lesa data úr hitamátarum á botni.

**Um túrin:** Vit fóru út mikudagin 15/2 kl. 1300. Siglt varð norðurum, har vit byrjaðu at taka standardskurð N. Vit tóku allar støðirnar og endaðu á N14. Haðani sigldu vit á skurð R, sum vit tóku frá R8 og inn ímóti Mykinesi.
Frá Mykinesi var siglt vestur av Føroyabanka, har skurður P varð tikin. Á hesum skurðinum fingu vit spælskaða, men við hjálp frá góðum og kreativum maskinmonnum, varð hesin trupulleikin loystur eftir nøkrum tímum og vit kundu halda fram.
Siglt var so inn á skurð K, sum er ein nýggjur skurður úr Bankarennuni og inn ímóti Koltri. Vit tóku skurðin inneftir. Frá hesum skurði varð siglt á skurð V, sum vit tóku út á Føroyabanka.
Haðani sigldu vit eystur á skurð S. Har vit byrjaðu við støð S1 á Munkagrunninum og tóku so hendan skurðin ímóti Hetlandi. Av tí at veðrið øtlaði og tíðin fór at ganga undan, tóku vit ikki ta síðstu støðina S19 á hesum skurðinum.
Siglt var so norður á skurð E, sum vit tóku inneftir og endaðu inn ímóti Høgnaboða. Á hesum skurði tóku vit ongar millumstøðir, vegna vánaligt veður og tíðarneyð.

**Prøvataking:** Við Seabird CTD-ini tóku vit 82 støðir og salt á 53 støðum. WP2 glúp á 29 støðum.
Á støðunum R8,V6, S8, N4, N5, N13, N14 vóru prøvar tiknir av tøðsøltum.
Á støðunum N7 og V6 vóru prøvar tiknir til goymslu.
Á støðunum R8, S8, V6, N5 og N14 vóru prøvar tiknir til kanning av havsúrgan.
Á støðunum S1, S2, S8, V1, V2, V6, N1, N2, N5, E1 og E2 vóru prøvar tiknir til kanning O18.
Á øllum støðum á skurði K vóru tiknir prøvar av tøðsøltum og plantuæti

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvarnir verða analyseraðir í vár.

**Viðmerkingar:** Á skurði S vóru støðir eisini tiknar í bretskum sjógvi.

23-02-2017

Regin Kristiansen




Kósir og støðir á túri 1702